# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt vet av Visjón 2015

Visjón 2015, sum fyrrverandi løgmaður Jóannes Eidesgaard tók stig til og fekk fest á blað var eitt sera áhugavert og politiskt nýskapandi tiltak. Fyri fyrstu ferð royndi ein landsstýrissamgonga at seta upp nøkur heilt greið politisk mál fyri eitt ávíst tíðarskeið.

Visjón 2015 var ein djørv roynd at taka eina peilig av framtíð Føroya í einum altjóðagjørdum heimi, har kunningar og samskiftistøknin fullkomuliga hevði broytt allar vanliga og kendar fortreytir fyri politiskar planlegging av samfelagsmenningini. Tað var tískil ikki av tilvild, at útbúgving, gransking og nýmenning áttu so nógv rúm í Visjón 2015. Í Visjón 2015 skjalinum, *Mál og vegir*, varð staðfest, at vitan er eitt hitt mest týdningarmikla tilfeingi í einihvørjari tjóð í altjóðagjørda heiminum. Síðan var ítøkiliga greitt frá teimum ætlanum, ið skuldu leiða Føroyar fram til eitt eina samfelagsstøðu, har vitanarframleiðsla og ikki vøruframleiðsla var høvuðsálitið, tá komið var fram til ár 2015.

Tað er tí ikki sørt áhugavert, at vit síggja nógv av øllum hesum aftur í tí løgmansrøðu, sum Kaj Leo Johannesen helt á ólavsøku. Partarnir av røðuni, ið snúgva seg um gransking, nýmenning, skúlaskap og útbúgving eru sera áhugaverdir og eru heilt týðuliga merktir av, at landsstýrissamgongan hevur tikið hendan partin av Visjón 2015 til sín og hevur skilt, hvussu ómetaliga týdningarmikið alt hetta økið er. Føroyar eru í dag partur av alheiminum og alheimurin er í roynd og veru ein felags arbeiðsmarknaður hjá føroyingum. Í hesum høpi hevur útbúgving alt at siga, og tørvurin á vælútbúgvnum fólki er mestsum óavmarkaður. Hetta kann staðfestast, hóast heimurin í løtuni stríðist við bæði fíggjarkreppu og búskaparkreppu. Henda kreppa varir ikki í allar ævir. Allar keppur fáa ein enda og besta tilfeingi er og verður eitt væsl skúlað og vælútbúgvið fólk.

Støðið undir útbúgving og vinnuligari menning er gransking á øllum týðandi samfelagsøkjum. Í løtuni nýta vit minni enn eitt prosent til gransking og nýmenning, meðan UNESCO hevur ásett trý prosent sum minstamark. Hetta minstamark hava grannar okkara langt síðan rokkið, so tað kann uttan víðari staðfestast, at á hesum øki eru Føroyar tilafturskomið land. Tað er tí bæði skilagott og gleðiligt, at løgmaður boðar frá, at nú skulu eisini vit uppá hesi trý prosentini. Hetta er sjalvsagt eins neyðugt og tað er skilagott, um vit skulu gera okkum nakra vón um at troyta teir møguleikar, sum ES granskingarsáttmálin gevur okkara granskingarstovnum og einstøkum granskarum. Nú nærkast so sannleikans tími fyri føroyskan granskinarpolitikk. Hetta merkir, at vit her og nú og ikki um eini fimm til tíggju ár skulu uppá hesi magisku trý prosentini. Alt hetta krevur samskipan, ráðgeving, nýggjar bygningar, umvæling av niðurslitnum hølum, skipan av nógvum granskinagrstørvum og ph.d. studningum, nýggjar útbúgvingar og sum heild eina samskipan av øllum hægri útbúgvingum í Føroyum. ABC 1 setti sjøtul á alt hetta, nú verður spennandi um ANC 2 megnar at fullføra hesa tilgongd, sum fer at krevja nógv øktar játtanir til gransking og hægri útbúgving.

**Sosialurin**

## Hvar er Sjónvarp Føroya?

**ALBERT ISFELD**

Tórshavn





**Tað var í dýrdarveðrinum leygardagin tann 25. juli, at ein armada av bátum og skipum úr Suðuri stevndu inn á Havnarvág at heiðra Havnini á 100 ára degnum sum fólkavald kommuna – Sjónvarp Føroya sá ikki hesi tíðindini!**

Henda dagin sóðu øll havnarfólk **tíðindini**, eina armadu av bátum og motorbátum við sluppini Jóhannu við fullum seglum á odda, og fylgdir av motorbátum í Havn, koma siglandi niðan gjøgnum Nólsoyarfjørð og stevna beint inn móti bátabrúgvunum á Vestaruvág.

Vit høvdu hoyrt tíðindini um, at suðringarnir skuldu koma, hetta vóru bátar úr Vági, men við vóru eisini fólk aðrastaði frá í Suðuri.

Tíggju grindabátar við árum og seglum og ein deksbátur løgdu at her. Tó legði Jóhanna at við Bursatanga á Eystaruvág.

Tað var ikki sørt, at vit hundraðtals fólk úr Havn, sum stóðu við Effersøes Bryggju, sum er fyrsta atløgubryggjan í Føroyum, vóru rørd at síggja henda flotta flota við umleið 120 fólkum úr Suðuri leggja at her at heiðra okkum.

Tórshavnar Býráð við Heðini Mortensen á odda høvdu gjørt eina stórfingna móttøku við limum í Havnar Harmonikufelag, sum spældi sjómannsangir, og Heðin helt eina frálíka móttøkurøðu suðringum til heiðurs, har hann bjóðaði teimum vælkomnum.

Hann nevndi í røðuni um framtakshuga suðuroyinga og teirra kosmopolitiska hugalag, áðrenn vit norðanfyri høvdu fingið medvit um hesi viðurskifti.

Eisini nevndi hann suðuroyingin, sum fekk í lag at gera bryggjuna, sum vit stóðu á, nevniliga navnframi Rasmus Effersøe, sum nú stendur sum standmynd á Tinghúsvøllinum.

Aftan á hesa løtu á bryggjuni bjóðaði býráðið til døgurða í »Reinsarínum«, og er hetta ein gestus, sum bert verður tilegnað heiðursgestum – og soleiðis føldu vit øll, sum vóru á bryggjuni henda dagin, at hetta var ein heiðursløta.

**- Sjónvarp Føroya varnaðist ikki løtuna!**

Meðan vit stóðu á bryggjuni og sóðu hesar tignarligu suðringarnar - teir nógvu í morreyðum troyggjum - var hildið, at hetta er ein sjón, sum Sjónvarp Føroya fór at fáa nógv burtur úr myndliga, tí helst er hetta flottasta løtan myndaliga, sum nakrantíð hevur verið á Vestaruvág og eisini var her møguleikin at fáa interwiev við fleiri ið her vóru, sum eg dugdi at síggja, fólk í øllum aldri. **- Men gakk – Sjónvarp Føroya sá ikki tíðindini!**

Vit kunnu undrast á, at sjónvarpið so ofta »gloymir« føroyskar hendingar og tíðindi, serliga, um hesar hava við okkurt at gera, sum ikki hevur focus í Havn.

Undantikið eru tó festivalarnir, men, men, lívið er annað enn festivalar, tónleikur og ítróttur.

Í parantes skal nevnast, at vit eru øll sera fegin um tann dekning, sum sjónvarpið gevur av festivalum, tónleiki og ítrótti.

Men vit gjalda øll Sjónvarpið og tað snýr seg um tíggjutals milliónir. Vit mugu kunna krevja eitt ávíst støði og nøgd av føroyskum sendingum, tað kann ikki vera rætt, at næstan allar sendingarnar eru frá DR1, DR2 og TV2.

Henda løtan á bryggjuni hjá Rasmus Effersøe var ein hending, sum kastaði ljósið á eina farna tíð og sum so er hon ein livandi mynd av varðveitingarmentan, sum her var framførd fyri okkum, eitt livandi fornminnissavn. **- Sjónvarp Føroya sá ikki søguna!**

Eg veit væl, at tit í SVF nú helst fara at siga, at tit hava ikki orkuna til slíka sending, hertil er at siga, **at tit skulu hava orkuna til slíkar sendingar um tað er ein lítil eldsál í tykkum, tí vit eiga altíð at gera okkara besta.**

Rættast hevði verið, um tit fóru til Vágs við kameraum og allari badugliuni at ævigtgera hendingina, tá ið bátarnir fóru og fylgdu teimum til Skálavíkar, har teir løgdu inn og vóru stórfagnaðir av bygdarfólkinum har við óførum blíðskapi, og síðani til Havnar – tað hevði verið ein sending! – **Men tíverri sá SVF heldur ikki henda møguleika!**

Dagur og vika mánadagin eftir vísti í endanum av sendingini eitt lítið pipp við sjáldsama vánaligum myndum, sum vóru skandaløst redigeraðar (harmonikumusikkurin hevði fingið ein raptus) – onki at bjóða fólki, betur var um onki innslag var, heldur enn hetta neyðareggið – **Eisini her vísti SVF sína ómegn!**

**PS.**
Tað er ikki meiningin við hesum kritikki av SVF, at útspilla ella taka mótið frá nøkrum, men at eggja SVF vinarliga, at gera sítt besta.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.